## DAGSINS MEINING

# Ein sjónleikur við lít

Politiski sjónleikurin á hesum sinni var av á middegi ígjár, tá forsætisráðharrin for aftur til Danmarkar. Bæði leikstjórin og leikarar kunnu gleðast, tí alt eydnaðist so stak væl. Allir partar fegnast, tí allir partar vunnu ein sigur, siga teir. Líka mikið, hvussu gongdin undan tí síðsta leikinum upprunaliga varð stungin út í kortið.

Forsætisráðharrin tóktist at koma við einum stórum gávupakka, og líkt var til, at hann kundi ganga øllum ynskjum føroyinga á møti. -Men tit sleppa bara at spæla innan fyri karmin í Ríkisfelagsskapinum! Segði hann.

Hinvegin, fara vit aftur um orðini og smílið, so segði hann einki nýtt. Tað var ein endurtøka av tí, sum undanfarna stjórnin segði. Orðini vóru bara nøkur onnur og kanska meiri vinarlig. Tey gliðu betri niður og vórðu ikki søgd úr erva – »góðu børn, nú mugu tit skilja«-hugburðurin var burtur. Og tað hevði forsætisráðharrin – og Sambandsflokkurin – sannliga brúk fyri, nú val er fyri framman og viðurskiftini millum Føroyar og Danmark helst skulu betrast, eftir at konfrontatións-kósin hjá Tjóðveldinum hevur tapt.

Hóast formaður Tjóðveldisfloksins eftir leikin í Tinganesi fegnaðist og staðfesti, at talan var um sjey-míla-ferð móti fullveldinum, so kann ikki sigast annað enn, at Tjóðveldisflokkurin hevur tapt so dyggiliga í fullveldisgongdini.

Tað, sum forsætisráðharrin bjóðaði, og tað sum løgmaður og varaløgmaður hálsfevndust um, er eina og aleina talan um yvirtøkur innan fyri karmarnar av Ríkisfelagsskapinum. Ein nútímansgerð av heimastýrislógini varð tilboð hansara. Vit eru ikki komin eitt vet nærri nøkrum fullveldi, sum eftir ætlan landsstýrisins longu skuldi verið skipað, eftir fólkaatkvøður um fullveldi og grundlóg í 2001. Men sum tann gløggi politikkarin varaløgmaður er, so letst hann sum hann er tann stóri sigurharrin. Hann hevur fyri neyðini at fyrigykla tí ørkymlaða veljaranum at okkurt er vunnið. Minnir mest um »nýggju klæði keisarans«.

Løgmaður er afturímóti samgonguleiðarin, sum í dag kann staðfesta, at tað var tann nýggi leisturin í sjálvstýristilgongdini sum sigraði. Hann er tann savnandi, alfaðirligi løgmaðurin, sum fekk savnað landsstýrissamgonguna um eina meira hóvliga leið, sum »miðleingjan« í Fólkaflokkinum kundi ganga við til.

Vit mugu bara staðfesta, at vit vóru óivað komin longur á sjálvstýrisleið, um vit høvdu valt sjálvstýristilgongdina hjá Javnaðarflokkinum. Hóast alt kann samgongan erpa sær av einum. Hon fekk skorið blokkin við einum triðingini. Man tann sigurin kann eisini enda sum ein pyrrus-sigur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvør er faðirin at barninum?

**Kári P. Højgaard**
*løgtingsmaður*



Sunnudagin 6. januar upprann so tann dagur, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Kartin Hansen, boðaði frá, at eitt uppskot um betran av pensiónunum var í ljósmála. Mánadagin á middegi boðaði løgmaður frá hesum sama í Rás 2. Seinni greiðir landsstýrismaðurin, sum umsitur málsøkið, Sámal P. í Grund, frá í grein í Sosialinum. Allir tríggir greiða á felags tíðindafundi frá innihaldinum í uppskotinum.

Helena D. á Neystabø, løgtingskvinna, hevur í fleiri bløðum skrivað um pensiónir og hevði eisini møguleika at betra um støðuna hjá pensionistum saman við samgonguni, men valdi at marknaðarføra seg við egnum uppskoti, sum eisini fall.

Harumframt hava fleiri onnur tingfólk havt sínar viðmerkingar til uppskotið, og hóast onkur negativa røddin hevur verið at hoyrt, gleðast allir um, at ein batan er í eygsjón hjá pensionistunum.

Sjálvstýrisflokkurin umsitur oljumál umframt almanna- og heilsumál. Ivaleyst hevði Amerada Hess bólkurin funnið olju, um Eyðun Elltør ikki var ráðharri, men ein sannroynd er, at hetta hendi seinasta heyst, og eru vónirnar góðar fyri hesum málsøki.

Nógvir pápar tykjast verða til pensionistabarnið, sum er um at síggja dagsins ljós. Tað er ikki tað týdningarmesta, at rætti pápin fær æruna, men at uppskotið verður samtykt og sett í verk skjótast gjørligt. Hinvegin so fegnist eg um úrslitið, og kunnu fleiri vátta, at mín leiklutur í hesum máli ikki hevur ligið eftir. Eg fari ikki at biðja um blóðkanning av burðinum fyri at staðfesta, hvør pápin er, men eg taki hann at mær sum mín egna.

Samgongulimir eiga tøkk fyri, at hesin batin til pensionistarnar kann síggja dagsins ljós í tólvta tíma. Somuleiðis eigur andstøðan sítt rós fyri at hava lagt fleiri uppskot fram seinasta árið og sostatt skumpað undir, at hesin batin gjørdist veruleiki.

Eg vóni, at málið verður einmælt samtykt og verður ein sjónligur bati fyri flestu pensionistar.

# Opinleikin hjá Jan Christiansen

**Jógvan Arge**
*býráðslimur í Havnfyri tjóðveldisflokkin*



Tú verður linur í knøunum og tárini vilja renna, tá borgarstjórin Jan Christiansen tekur orðið.

Nú skrivar hann, at Tórshavnar Býráð er meiri opið enn nakrantíð. Ein av hansara sterkastu próvgrundum er, at skráirnar fyri býráðsfundir liggja frammi á bókasavninum.

Tú verður freistaður at spyrja, hvussu nógvum fólkum, hann røkkur har?

Hinvegin eru skráirnar ikki at síggja alment í miðbýnum. Ein lítil lepi er komin at hanga í eini talvu á býráðssalinum og vísir fólki inn á Snarskivuna at lesa býráðsskráir. Men har stendur onki um, nær fundirnir eru.

So kunna fólk sjálv døma um, hvussu góðan hug Jan Christiansen hevur at upplýsa sítt fólk um býráðsins arbeiði.

Eg loyvi mær at endurtaka, at hugburðurin at kunna borgararnar um, hvat Tórshavnar Býráð hevst at, hevur ikki verið nóg góður.

Nú lovar borgarstjórin, at hann fer at taka nýtíðar tøkni rættiliga til hjálpar at bøta um hetta. Vit eru fleiri, sum fegnast um tað, men kortini ber tað enn ikki býráðslimum í Havn til at fáa kopi av skjølum í málum, sum teir skula viðgera og taka støðu eftir. Tað er ein avoldaður hugburður.

Ymisk tekin eru kortini um, at tað ger mun at finnast at mannagongdum í býráðnum. Málið um, hvør skuldi gera barnagarðarnar var hendan dagin sett til viðgerðar á fundi fyri læstum hurðum fyrst – og síðani fyri opnum hurðum.

Minnilutin spurdi sjálvandi, hví málið skuldi viðgerast á tveimum fundum, og nær orðaskiftið og atkvøðugreiðslan fóru at verða – á tí stongda fundinum ella opna.

Borgarstjórin segði, at tað var gamal siður at viðgera og avgera slík mál fyri læstum hurðum og so kunna eitt sindur um tey fyri opnum hurðum.

Hetta hildu vit vera órímiligt og bóðu um at fáa viðgerðina fyri opnum hurðum. Borgarstjórin var eitt sindur trekur og byrjaði viðgerðina fyri læstum hurðum, men vit gjørdu greitt, at vit ætlaðu at spara krútið til tann opna fundin.

Tí varð hetta málið viðgjørt fyri opnum hurðum. Tað var eitt stórt stig fram á í søguni um býráðsins opinleika, og tað fegnast vit um, men tað var ikki fyrst og fremt borgarstjóranum fyri at takka.

Um fundarskipanina er stutt at siga, at hon framvegis tykist mær at vera eitt tól, sum serliga hevur til endamáls at avmarka orðaskiftið á opnum fundum.

Tað er møguligt, at eg havi verið við til at staðfesta hesa skipan fyri einum ári síðani, men tá hevði eg av góðum grundum ongar royndir av, hvussu darvandi hon er.

Tað havi eg nú, og tí haldi eg, at vit skula taka hana og opinleikan sum heild til gjølla viðgerð. Tá tæna vit kommununi og borgarunum best – og tað er tað, vit eru í býráðnum til.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

## VIÐMERKINGAR

# Ein viðmerking til formannin fyri Mentunargrunn Landsins

**Jógvan Isaksen**



Leygardagin 12. januar hevði Sosialurin samrøðu við føroyskar bókaútgevarar og við formannin í Mentunargrunni Landsins, Róa Patursson. Bókaútgevararnir – teirra millum undirritaði – vildu vera við, at stuðulin frá Mentunargrunni Landsins til føroyska bókaútgávu var minkaður so nógv, at mong forløg fóru at leggja stilt ella taka øll rep í seglini.

Formaðurin í Mentunargrunni Landsins vísir ikki frá sær, at føroyska bókaútgávan er minkað við nærum einum triðingi farna árið, og at studningurin til ta einstøku bókin er væl minni enn áður. Um somu tíð ger hann vart við, at tað er ikki vist, at føroysk bókaútgáva fer at fáa fleiri pengar, tó at Mentunargrunnur Landsins fær eina hægri játtan. Tað er so nógv annað, sum hevur stuðul uppiborið innan føroyskt mentanarlív.

Hetta er ein greið mentanarpolitisk støðutakan, sum bæði formaður og nevnd sjálvsagt hava teirra fulla rætt at hava, hóast tað er eitt bakkast fyri føroyska bókaútgávu. Men beint frammandundan í samrøðuni sigur formaðurin, at vit skulu ansa eftir ikki at dramatisera niðurskurðin til bøkur, tí: »Tað, eg veit um, eru allar tær bøkurnar komnar út, sum Mentanargrunnurin hevur latið stuðul til«. Við øðrum orðum: Tað eru bara forleggjararnir, sum geva ilt av sær. Bøkurnar koma kortini.

Men her er komin kuril á logikkin hjá formanninum. At tær bøkur, sum stuðul er latin til, koma út, er tí at avgerðin longu er tikin frá forløgunum, tá ið umsóknin verður latin inn. Av royndum vita vit, hvussu smábýttur studningurin hevur verið í reiðiliga eitt ár, og tí verða bókaútgávur steðgaðar, áðrenn Mentunargrunnur Landsins verður søktur. Tað er sostatt nógv, sum verður steðgað, tí at forløgini framman undan vita, at hetta fer ikki at bera til.

Hevði stuðulin frá Mentanargrunni Landsins verið á sama støði sum fyri t.d. tveimum árum síðani, vóru væl fleiri bøkur komnar út upp undir jólini 2001. At tað komu so nógvar bøkur út fyri jól 2000, tá ið sama nevnd býtti somu upphæddir út, var millum annað tí, at vit í forløgunum enn ikki vóru greið yvir, at studningurin var so nógv minkaður. Í dag dragast vit øll við undirskot frá hesum bjartskygda skeiði.

# Løgting og landstýri ímóti fólkinum, til frama fyri tey fáu

**Edmund Joensen**



Tá landsstýrið minkar blokkin, er tað fjøldin ið missir, meðan tey fáu fáa stóra vinningin úr oljuríkidøminum hjá øllum føroyingum.

Sett er á nýggja árið og landsstýrið hevur minkað frumintøkur Føroya við 400 mió. kr um árið – hvørt ár. Blokkstuðulin fer sum kunnugt stórt sæð allur til lønir innan heilsuverkið, útbúgvingarverkið og almannaverkið. Blokkurin er sostatt til fyrimunar fyri alt tað føroyska fólkið og ikki bert fyri tey fáu. Teir serkønu siga, at tann sonevnda multiplikatoreffektin av hesum er 2,5. Tað vil siga, at búskaparligi missurin fyri føroyingar er ikki einans 400 mió. kr., men ein heil milliard.

Í Útvarpinum herfyri segði formaðurin fyri Landsfelag pensionistanna, at hevði landsstýrið bert bíða í eitt ár við at skorið blokkin niður, høvdu teir verið førir fyri at bygt eina røð av ellis- og avlamisheimum runt landið. Hetta er so satt sum tað er sagt.

**Oljan átti at komið øllum føroyingum til góðar**

Nógv eru tey sum vóna, at olja finst í nóg stórum nøgdum, til at vinna naka aftur av sjálvgjørda tapinum hjá landstýrinum, og tey flestu vóna eisini, at oljan kann koma øllum føroyingum til góðar.

Mær untist sum løgmaður at umsita oljumál alt landsstýriskeiði frá 1994 til 1998. Tað var tá, at stóra oljufyrireikingin fór fram og var í hæddini. Sjálvur var eg ongantíð í iva um, at allir føroyingar skuldu fáa lut í tí vinninginum, sum kom burtur úr oljuni. Skuldi hetta eydnast, var neyðugt at tryggja hetta longu frá byrjan av í loyvistreytunum til oljufeløgini. Tað var fyri mær ein sjálvfylgja, at eigarin av grundstykkinum skuldi seta treytirnar. Eigarin er alt føroya fólk.

**Alment borið oljufelag**

Eins og norðmenn gjørdu, skuldu vit tryggja okkum, at eitt alment oljufelag skuldi hava rætt, ella optión, til at verða »borið« av teimum oljufeløgum, sum fingu loyvi at taka okkara olju upp. Landsstýrið kundi tá, um olja var funnin, seinni gjørt av um allmenna felagið sjálvt gjørdi nýtslu av optiónini, ella seldi rættin til aðrar at nýta.

Norska fólkið selur Statoil fyri ótal av milliardum. Allar hesar milliardirnar koma øllum tí norska fólkinum tilgóðar, og ikki bert nøkrum fáum.

**Alt var fyrireika**

Ì fyrireikingunum var hetta tikið við og lá púra klárt at seta í verk. Sjálvur setti eg serliga nevnd at fyrireika allment oljufelag. Nevndin hevði gjørt eitt útførligt og drúgt útgreiningararbeiði á hesum øki. Arbeiði var liðugt og álit var skrivað, sum í smálutum lýsti, hvussu hetta á besta hátt kundi gerast.

**Sitandi landstýrissamgonga feldi uppskotið**

Verandi landstýri vildi ikki hava eitt alment oljufelag ella optión til alt tað føroyska fólkið.

Hetta bleiv slettis ikki tikið við í treytirnar til oljufeløgini. Aftaná at hava barst fyri okkara sjónarmiðum í løgtingsnevndum uttan úrslit, legði Sambandsflokkurin sítt egna uppskot fyri føroya løgting, men hetta var felt av sitandi samgongu.

**Landstýrið og teir privatu**

Landstýrið valdi ístaðin at lata tey privatu feløgini fáa frítt spæl. Oljufeløgini, sum bera tey fáu, fingu tey bestu oljuøkini. Úrslitið verður, at komandi oljuvinningurin verður býttur millum nakrar fáar føroyingar sum høvdu nóg mikið frammanundan, meðan meginparturin av føroya fólki hyggur at. Stórtíðindi í FREGNUM seinast prógva, hvussu eitt lítið oljufelag fær virði á trimum miljónum til hálva milliard.

**Tey fáu fáa meginpartin, meðan fókið fær restina**

Jú blokkurin uppá meira enn eina milliard, svarandi til búðskaparligan fyrimun uppá minst tríggjar milliardir verður tveittur burtur. Alt føroya fólk, missur henda fyrimun. Eydnast tað at fáa endurvunnið henda missin frá komandi oljuríkidømi, koma tey fáu at fáa tann stóra fyrimunin, meðan føroya fólk fær restina, um/tá restin eina ferð kemur til sættis.

Flestu dømir um smá lond, sum hava loyst frá størri londum, vísa eina óhugnaliga skeiva gongd í býtinum av samfelagsinntøku og ognum. Tá finna vinstrahallir sosialistar og høgravendir kapitalistar saman. Tey fáu dusa sær, meðan fólkið oftast situr eftir við sviðið so. Verður hetta eisini gongdin hjá okkum?

# Orðasmíð

**Annita á Fríðriksmørk**



Nú er Anders Fogh Rasmussen so farin heimaftur eftir sína fyrstu Føroya vitjan. Ongin ivi um, at her var ein glotti at hóma, fyri einum betri dialogi millum Føroyar og Danmark.

Men einastaðni eru Anders Fogh og Poul Nyrup ein og hin sami, og tað er í spurninginum um, hvussu langt føroyingar kundu sleppa á fullveldisleið. Teir brúktu báðir nøkur hugtøk, sum eg haldi, at teir sluppu í so væl avstað við. Nemliga hugtøkini ríkisfelagsskapur, javnbjóðis partar og orðið loysing. Hesi hugtøk verða brúkt, sum um at føroyingar og grønlendingar eru ein javnbjóðis partur við danir. Her er ikki talan um ein felagsskap, men um eina ríkiseind, har evsta valdið og yvirvaldsrætturin liggur í danska fólkatinginum. Og hetta er ein rættur sum danska stjórnin til ein og hvørja tíð vil varðveita, tí hesin rættur gevur pengar og vald.

Tá ið tú tosar um Sameindu Tjóða, Europasamveldið og Norðurlandaráðið, so kanst tú tosa um felagsskapir har allýsingin av hesum felagsskapum er, at teir eru felagsskapir millum javnbjóðis partar. Men hesar tjóðir, sum eru limir í hesum trimum felagsskapum hava allar fullveldi og tí eru tær javnbjóðis partar við hinar tjóðirnar í hesum felagsskapum.

Í orðaskiftinum millum Føroyar og Danmark tykist tað, sum at tað framhaldandi verður manipulera við hesum hugtøkum. Og summir flokkar á løgtingi hava enntá gjørt hetta hugtakið ríkisfelagsskapur til avgerandi markið fyri, hvussu langt teir kunnu fara á sjálvstýrisleið.

Orðini ríkisfelagsskapur og javnbjóðis partar verða brúkt positivt, og orðið loysing verður brúkt negativt. Anders Fogh segði, at vit kundu fáa so nógv sjálvstýri, sum vit ynsktu, men at markið gekk við ríkisfelagsskap, donsku krúnuna og danska gjaldoyra. Men hvat leggur hann í hugtakið ríkisfelagsskapur, og hvat kunnu vit eftir hansara leisti, sum vit ikki kunnu í dag.

Tá ið hann tosar um javnbjóðis partar, so ljóðar tað sum um, at Føroya Løgting og Fólkatingið skulu verða javnbjóðis ella líkastillaði yvir fyri hvørjum øðrum. Tá vit eru javnbjóðis partar, eftir Fogh´sa allýsing, hvør umsitur tá føroyska fullveldi og føroyska yvirvaldsrættin.

Eisini vita vit, at orðið ríkisfelagsskapur ikki finst í altjóða rætti, og at ongin faklig lýsing finst um, hvat orðið merkir.

Tá í hesi hugtøk framhaldandi eru avgerandi fyri støðutakanina hjá pørtum av løgtinginum og somuleiðis hjá Føroya fólki, hevði verið gott at fingið at vita frá m.a Anders Fogh, hvat hann leggur í hugtøkini ríkisfelagsskapur og javnbjóðis partar og loysing. Og vóni eg, at hann verður spurdur um hetta, tá ið høvi býðst!